


# Faroe Petroleum hækkar kapitalin

**Jan Müller**

12.06.2014 - 18:20

Oljan.fo

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið ætlar at útvega umleið £45 mió. (svarandi til umleið kr. 415 mió.) við einari kapitalhækkan. Kapitalhækkanin kann gerast størri um eftirspurningurin er stórur.

Kapitalhækkanin verður tøk fyri nýggar og verandi institutiónellar partaeigarar. Kapitalhækkingina ætlar felagið at brúka soleiðis:

§ Framhaldandi luttøku í leitiboringum í Norra tey næstu 2 árini við týðandi ognarskapi,

§ at varðveita 25% luttøku í spennandi og virðisøkjandi Pil uppfylgingar verkætlan,

§ at menna 52 mió. tunnir av olju- og gasstilfeingi fram ímóti útbygging og realisera møguleikar fyri

øking av verandi framleiðslu og

§ uppkeyp av framleiðslu (íroknað Schooner og Ketch handilin, sum varð kunngjørdur í apríl).

Graham Stewart, forstjóri í Faroe Petroleum, sigur í einari viðmerking, at strategiin hjá felagnum við áherðslu á leiting, stuðlað av framleiðslu, hevur eydnast sera væl, við 7 fundum síðani 2010. Í hesum tíðarskeiði er framleiðslan hjá felagnum ferfaldað, meðan olju- og gassreservarnir eru øktir áttafaldað.

Kapitalhækkanin fer at geva felagnum ta fíggjarligu styrkina, sum skal til fyri at troyta teir møguleikar, ið liggja fyri framman, sigur felagið í tíðindaskrivi.